




# Degnshús gerast friðingarmál

**Steffen Stumman Hansen, landsantikvarur, hevur gjørt av at taka málið um Degnshús upp sum friðingarmál. Nú skulu húsini kannast, áðrenn Friðingarnevndin um nakrar mánaðir kemur við einum tilmæli til landsstýrismannin**

FRIÐING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*Degnshús eru nú friðingarmál, eftir at landsantikvarurin hevur gjørt av at søguliga virðið í húsinum skal kannast nærri*

Málið um gomlu Degnshús við Tinghúsvegin í Havn dregur út. Nú hevur Steffen Stumman Hansen, landsantikvarur, gjørt av at taka málið upp sum eitt friðingarmál.

Tað merkir, at byggideildin hjá Fornminnissavninum nú skal kanna húsini fyri at finna út av, um tey hava søguligt virði.

Spurdur, hvat avgerðin um at taka málið upp sum eitt friðingarmál byggir á, sigur Steffen Stumman Hansen, at avgerðin byggir á upplýsingar um sjálvt húsið, og søguliga umhvørvið, tað stendur í.

Upplýsingarnar hevur Fornminnisnevndin, har Steffen Stumman Hansen er formaður, frá Býarsavninum og Tinglýsingini.

– Harumframt kenna vit søguna um umhvørvið har á leið, vísir landantikvarurin á.

Men higartil hava fornfrøðisligu myndugleikarnir ikki verið og kannað sjálv húsini.

Eigarin av húsunum, Petur Olsen, hevur sagt seg illa duga at skilja, hví húsini skulu friðast. Hann hevur víst á, at húsini eru rættuliga nógv broytt, síðan Anton Degn búði í teimum. Millum annað var eldur í húsinum fyri trimum árum síðan, og tá bleiv alt loftið brotið niður og gjørt av nýggjum. Eisini er klædningur, vindeygu og gólv skift seinnu árini, so talan er um eini heilt onnur hús, vísir Petur Olsen á.

### Undirskriftirnar

Tá ætlanirnar um at taka Degnshús niður og í staðin byggja ein stóran bygning á staðið, elvdi tað til mótmæli frá fleiri síðum.

Fleiri býráðspolitikarar hava úttalað seg um tað skilagóða í at varðveita Degnshús, og yvir 3000 undirskriftir eru savnaðar til frama fyri at varðveita húsini.

Spurdur, hvørt hann hevur kent seg trýstan til at taka málið upp sum friðingarmál, sigur Steffen Stumman Hansen, at tað hevur hann ikki.

– Nei. Avgerðin byggir á eina sakliga meting av málinum, sigur landsantikvarurin.

Hann vil tó ikki útdýpa metingina meira.

### Dregur út

Sum nevnt fer byggideildin hjá Fornminnissavninum í næstum at kanna húsini. Um miðjan apríl hevur Fornminnisnevndin aftur fund, og tá fer nevndin væntandi at viðgera upplýsingarnar frá byggideildini. Velur Fornminnisnevndin tá at fara víðari við málinum, skal tað út til hoyringar, hetta tekur vanliga tveir mánaðir, áðrenn Fornminnisnevndin ger sítt tilmæli til landsstýrismannin í mentamálum.

– Í síðsta enda er tað ein politiskur spurningur, um húsini skulu friðast. Fornminnisnevndin kemur bara við sínum tilmæli, vísir Steffen Stumman Hansen á.

## 450 undirskriftir afturat

Seinnapartin mikudagin fekk borgar-stjórin í Havn, Jan Christiansen, fleiri undirskriftir afturat, har mælt verður til at varðveita Degnshús. Ingi Mohr, stigtakari, sigur at talan er um umleið 450 undirskriftir. Hesar skulu so leggjast afturat teimum 3186 undirskriftunum, ið vóru handaðar borgarstjóranum seinasta hósdag.

**jbh**

## Hevur ikki mist mótið

**Petur Olsen, ið eigur Degnshús, er bilsin av gongdini í málinum. Hann vísir á, at hann kannaði málið væl, áðrenn hann keypti húsini, og síðan hevur hann fylgt byggisamtyktini til fulnar. Tí skuldi talan verið um ein avgreiðsluspurning**

FRIÐING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

– Áðrenn eg keypti húsini, so kannaði eg, um nakar klausulur var á, um húsini vóru friðað og hvat byggisamtyktin fyri økið loyvir. Síðan keypti eg húsini einans við tí fyri eyga at byggja ein annan bygning har í staðin.

Tað sigur Petur Olsen, ið eigur Degnshús. Hann er bilsin av gongdini í málinum, tí eftir hansara tykki skuldi bara verið talan um ein avgreiðsluspurning. Longu nú hevur málið tikið langa tíð, og við avgerðini hjá landsantikvarinum um at taka tað upp sum eitt friðingarmál, eru útlitini fyri at koma í gongd skotin longur út í framtíðina.

So hóast hann hevur sett seg væl inn í viðurskiftini, so metir hann seg í dag hava keypt undir sera skeivum fortreytum.

Petur Olsen spyr, hvat hann skal nýta húsini til, um tey verða friðað, og svarar sjálvur. Einki.

Hann hevur tó ikki mist vónina enn, tí hóast gongdin fyri hansara viðkomandi er keðilig, so er tilmælið til landsstýrismannin um at friða húsini framvegis ikki skrivað, og í síðsta enda er tað landsstýrismaðurin, ið skal taka avgerðina.

Petur Olsen sigur seg ikki hava kannað møguleikan fyri at reisa endurgjaldskrav, um úrslitið verður, at húsini verða friðað. Hann ætlar sær fyrst at tosa við sakførara fyri at fáa greiðu á, hvar hann stendur í málinum.

# Stevna sær sjálvum

**Endi sæst loksins á gamla málinum um eftirlønarviðurskiftini hjá 13 handilsskúlalærarum. Tveir av lærarunum sita ávíkavist sum landsstýrismaður og aðalstjóri, samtíðis sum teir umvegis fakfelag stevna landsstýrinum. Málið verður tó væntandi avgreitt í løgtinginum, áðrenn tað verður tikið upp til dóms**

GEGNI
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Í vikuni varð mál fyri í rættinum, har millum aðrar landsstýrismaðurin í mentamálum og aðalstjórin í Mentamálaráðnum stevna Føroya Landsstýri.

Ikki út frá teirra núverandi positión, men sum lærarar við Føroya Handilsskúla.

Talan er um eitt mál um eftirlønarviðurskiftini hjá tilsamans 13 handilsskúlalærarum, og sum hevur skjótt 16 ár á baki. Í stuttum snýr tað seg um, at í setanarskrivi hjá hesum lærarum stendur, at skúlin skal innlima teir í ein danskan pensjónskassa. Til 31. desember 1987 var málsøkið danskt, og tí var hetta vanlig mannagongd, men eftir henda dato varð málsøkið flutt yvir í blokkskipanina, og tí bar ikki til longur.

Men í setanarskrivinum hjá hesum 13 lærarum, ið vóru settir eftir nevnda dato, er kortini komið at standa, at teir skulu innlimast í danska pensjónskassan, hóast hetta ikki ber til. Fyri lærarar, ið seinni vóru settir í starv, er málið loyst á tann hátt, at teir fáa pensjónsviðurskifti, ið líkjast teimum, ið vóru fyri 31. desember 1987.

Málið hevur verið uppi og vent fleiri ferðir, men nú vit skriva 2004 er málið framvegis ikki avgreitt, og landskassin hevur framvegis ikki formligu viðurskiftini í lagi til at rinda teimum eftirløn.

Teir 13 handilsskúlalærararnir hava, umvegis fakfelag sítt, stevnt Føroya Landsstýri fyri at fáa síni rættindi. Teirra millum eru sum nevnt Jógvan á Lakjuni og Petur Petersen.

### Kunnu stevna

Løgfrøðingar, sum Sosialurin hevur tosað við, vísa á, at øll hava somu rættindi til at stevna tí almenna. Og rættindini missir ein ikki, um ein fær starv hjá tí almenna. Víst verður á, at talan ikki er um arbeiði hjá landsstýrismanninum ella aðalstjóranum, men viðurskifti, ið einki hava við verandi arbeið teirra at gera.

### Gegni

Ein annar spurningur er gegni. Tí sum er sita landsstýrismaðurin og aðalstjórin so at siga báðu megin borðið. Teir stevna Føroya Landsstýri, og umboða samtíðis landsstýrið, ávíkavist sum partur av politiska stýrinum, og sum ein av hægstu embætismonnum landsins.

Harumframt liggur eitt lógaruppskot í løgtinginum nú, ið loysir knútin millum handilsskúlalærararnar og landsstýrið. Uppskotið, ið Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, legði fram 4. marts, gevur í stuttum hesum lærarum somu eftirlønarviðurskifti sum øðrum lærarum. Uppskotið byggir á eina nærum tvey ára gamla semju millum landsstýrið og Lærarafelag Handilsskúlans. Eitt ár seinni varð lógaruppskot sent til ummælis hjá fakfelagnum, og svar kom haðani í februar í ár.

Orsøkin til at málið liggur í Fíggjarmálaráðnum er, at talan er um eitt pensjónsmál. Tummas Magnussen, leiðari á lønardeildini, sigur at fíggjarmálaráðið hevur verið varug við, at ein av persónunum í dag er aðalstjóri í mentamálaráðnum. Hvat landsstýrismanninum viðvíkur er hann komin í starvið, eftir at semja varð funnin partanna millum.

Eins og Tummas Magnussen, so vísir eisini Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, til fyrisitingarlógina og reglurnar um gegni, ið siga at persónar ikki mugu taka lut í viðgerð av máli, teir sjálvur eru partur av. Bæði undirstrika, at hesi atlit eru fylgd í málinum.

Hvat rættarmálinum viðvíkur er tað ikki heilt slept enn. Hans Trúgvi Teirin, sakførari hjá handilsskúlalærarunum, sigur, at onkur smávegis viðurskifti eru í lógaruppskotinum hjá landsstýrinum, ið fakfelagið ynskir at fáa broytt, og tí er málið ikki slept enn. Men hesi viðurskifti væntar hann verða broytt í nevndarviðgerð áðrenn málið kemur til 2.viðgerð í løgtinginum. Og hendir tað, so verður sakarmálið neyvan tikið upp til dóms.